SOSIALURIN

Nr. 59 15. SEPTEMBER 1962 35. ÁRG.

Í DAG

STÓRT VÍSINDALIGT FRAMSTIG

Maskina sum aktar mannarøddina á veg

BÆÐI amerikanskir og japanskir vísindamenn arbeiða við maskinum, ið kunnu uppfata og gera sum mannarøddin sigur, Amerikumenn arkast við eitt elektroniskt oyra, sum í øllum lutum skal virka sum vanligt mannaoyra.

Japansku vísindamenninir hava longu gjørt eina maskinu, ið kann fata tølini frá 0 til 9 og endurgeva tey við einari skrivimaskinu. Teir arbeiða nú við einari fonetiskari skrivimaskinu, soleiðis at einum ikki nýtist at sita og trýsta stavirnar við fingrunum; men bert tosa við skrivimaskinuna, sum so endurgevur orðini á pappírið. Somuleiðis arbeiða teir við at seta hetta løgna tól í samband við automattelefonina, soleiðis at einum ikki nýtast at snara tølini við fingrunum; men einans siga tølini — og telefonin snarar so nummarið sjálv.

Kvinnan

UM GOYMSLU AV KONSERVESVØRUM

MINNST TIL: Allar konservesvørur megu metast og viðfarast sum feskar vørur í somu løtu, sum hol er sett á dósirnar ella flotini!

Heilkonserves (kjøt, grønmeti, frukt, suppur, sardinur; rogn; fiskamatur o.s fr.) er konserverað við upp til 120 hitastig og kann halda sær nærum óavmarknaða tíð

Hálvkonserves (ansjósur, sild, kaviar; agurkur, reyðbedur o.a. er konserverað við sukri, salti (við ediki) og øðrum konserveringstilfari. Eigud at verða goymt í kuldaskápi við 0—8 hitastig.

Meðaldeildin (pylsur, skinkur o.a.) er ikki vanligt konserves, men serskilt konserverað við upp til 100 hitastig. Skal goymast á køldum staði.

Vacumpakkaðar matvørur eru ikki konserveraðar og skulu viðgerðast og viðfarast sum feskar vørur og goymast í kuldaskápi við frá 0—8 hitastig.

—o—

»TAÐ vóru kvinnunevndir í javnaðarflokkinum, sum til seinasta kommunuval útvegaðu hvørt einasta oyra, ið valstríð flokksins kostaði á viðkomandi plássinum.«

SOLEIÐIS málbar Grete Hækkerup, skrivari, (kona nýggja uttanríkisráðharran) seg á ársaðalfundi danska javnaðarflokksins, og við stoltleika kundi hon leggja aftrat, at 40 pst. av limunum í flokkinum vóru kvinnur. í København- Frederiksberg 48, 9 pst.



List

DANSKA stjórnin hevur sett eina serstaka listarnevnd ið skal gera tey neyðugu uppskot til bøtan av korunum hjá øllum listargreinunum.

EIN av høvuðsuppgávunum verður eisini at spjaða út kunnleikan millum manna um skaldskap, tónalist og aðrar listargreinir eins og um mentunarligu og samfelagsligu virðir teirra, Julius Bomholt, mentunnarmálaráðharri, heitti á øll kommustýri um ikki bara at velja serstakar mentunnar- og listarnevndir, men eisini á hvørjari fíggjarætlan at játta neyðugan pening til listargreinanna kommunurnar. Sum er, segði Bomholt, hava listarmálini verið spjadd í allar ættir í kommununum og hava tí ofta verið av bert smávegis týdningi. Sama kann sigast um okkara heimligu viðurskifti; tað finst ikki kommunustýri, ið hevur sett serstaka nevnd til at samskipa og lætta um virkislíkindini hjá teimum ymisku listargreinunum.

Brævkassin

»BRÆVKASSI« Sosialsins.

Tá ein er fluttur og búsitandi í aðrari bygd enn ein er skattaður í nú tætt uppundir valið, hvussu kann ein tá bera seg at við at greiða atkvøðu til valið. Við tøkk fyri upplýsningar.

Jóhan.

SVAR: Hetta er lætt gjørt. Tað er einans at venda sær til kommunuskrivstovuna í bygdini og biðja um at fáa valt har. Atkvøðuseðilin má tó sendast til bygdina, ein er fluttur frá, ella har ein er á vallista.

—o—

Til »Brævkassan«

Tað er øgiligt, sum bløðini leika í um NATO-støðina á Samfelli. Tjóðveldismenn vilja gera hana til raketstøð, so sum teir fyri nøkrum árum síðani billaði fólki inn, at bergholini norðri í Vestmanna skuldu nýtast til goymslur fyri atombumbum. Hvussu leingi kunnu hesir menn fáa skilafólk at trúgva uppá slík skilaleys og óansvarlig øsingarróp? Og hvat siga fólk, sum ferð eftir ferð hava latið seg lumpa av ósannindis agitatión teirra? Tað er jú ikki so hugnaligt at vita, at ein er havdur til rukku fyri at fremja skilaleysa loysingarpolitikk tjóðveldismanna. Og hví leika teir so í, um teir ikki fáa loyvi at koma inn á NATO-støðina? Hvat hava teir har at gera? Ja, tað er so nógv, ein kundi spurt um; kanska Brævkassin kann svara mær uppá nakrar av hesum spurningum.

Ein, ið ongan bil hevur.

SVAR: Ja, vit minnast væl øsingina, tá SEV á sinni fór undir spreingingina har norðuri — og óivað vóru nakrar veikar sálir, ið lótu seg lumpa. Og nú vónar tjóðveldið at lumpa nøkur aftrat við lygusøgum sínum um rakettstøð á Samfelli — tað man valla fara at eydnast. Fólk duga nú yvirhøvur at siggja, at tjóðveldisflokkurin einki er uttan ein gøluflokkur, ið einki vil uttan loysing! Og hví NATO-støðin er stongd fyri fólki, ið einki annað vil enn njósnast, ja, tað mátti verið so líka til. Hvussu nógv virkir í Havn t. d. vilja hava ørindaleys fólk malandi á arbeiðsplássinum? Annars skulu vit minna á, at ein bóndi, ið stendur »14.« nær, ofta hevur lýst í bløðunum, at »tann ið verður sæddur í haganum uttan loyvi, verður meldaður.«

»KOMMUNALT NYT« eitur nýtt blað, sum danski javnaðarflokkurin er farin at geva út eitt blað, ið ivaleyst eisini hevur boð til føroyskar sóknarstýrislimir, ið vissuliga ikki hava ov mikið av vísdómskeldum í kommunalum viðurskiftum at troyta

Høvuðsendamálið er at leggja til brots fyri sonnum og vísindaligum upplýsingararbeiði um øll kommunal viðurskifti, øll málløki, ið hin einstaki sóknarstýrislimurin skal viðgera og taka støðu til. Í blaðnum finnur ein vanligar greinir, lógir, reglugerðir; viðmerkingar; brævkassa og annars alt av áhuga fyri sóknarstýrislimir í dagliga virki teirra.

Leiklist

SJÓNLEIKUR OG ÚTVARP?

Serstakliga fjarsýnið í øðrum londum og partvís eisini útvørpini taka nú fleiri og fleiri av teimum, ið áður trúliga vitjaðu sjónleikarhúsini og biografhøllirnar. Eisini vit hoyra nú sjónleik í útvarpinum og ivaleyst verður tað ikki seinur dagur, tá fjarsýn verður eins vanligt og radio í føroyskum heimum. Um áðurnevnda evni sigur Julius Bomholdt, mentamálaráðharri:

»Um vit skulu hava livandi »sjónleik« í radio og fjarsýni, er tað ein avgjørd treyt, at tað uttanfyri mikrofonirnar og myndartólini er eitt land, har leiklistin er livandi. Eitthvørt slag av tílikum sjónleiki krevur sjónleikarhús kring um alt Danmark. Tað vil skjótt merkjast, um alt skal flytast yvir radio og TV. At enda verður at kenna seg einsamallan í einum tómum rúmi.«

hugskot

TEY UNDIRFULLU SKÝGGINI er heitið á bók eftir heimskenda skaldinum Francoise Sagan og byggir hetta verk á hálliterert støði. Heitið sipar til prosayrking eftir Charles Baudelaire, har tað verður sagt:

Hvønn elskar tú mest, tú loyndarfulli maður: tín faðir, tína móður, tína systur ella tín bróður?

— Eg havi hvørki faðir ella móður, hvørki systur ella bróður.

— Tínar vinir?

— Tað er eitt orð, hvørs týdning eg ongatíð havi kent.

— Títt føðiland?

— Eg veit ikki, undir hvørji breidd tað liggur.

— Vakurleikan?

— Eg vildi fegin elska hann — hin guddómliga og ódeyðiliga.

— Gullið?

— Eg hati tað, sum tit hata Gud

— Hvat elskar tú tá, tú løgni fremmandi?

— Eg elski skýggini ... skýggini, sum reka framvið ... haruppi ... tey undirfullu skýggini.

veitst tú?

AT til frama fyri føroyskt tjóðskaparlív setti P. M. Dam, táverandi formður Føroya lærarafelags, uppskot fram á tingi at veita J. Dahl prósti stuðul til skrivstovuhald, so hann fekk betur stundir til at umseta bibliuna til føroyskt mál.

AT meginparturin av tí matinum menniskjuni eta, verður brúktur til upphiting av likaminum. Sjálvt í heitum veðri fara 2/3 til at halda likamshitanum við líka.

AT svenskir vísndamenn eru komnir til tað úrslit, at Svalbard er hækkað 2 metrar hvørji 1000 ár tey seinastu 8000 árini.

AT fyri 200 árum síðani vildu flestu dómstólar í Europa ikki góð taka vitnisburðar hjá sjónleikarum; teir vóru »syndarar« og tí ikki at líta á.

AT kossurin ikki er heilt vanligur millum menniskju; tí í heiminum finnast 800 milj. menniskju, ið aldri nýta henda sið.

AT fuglafrøðingar vita at siga frá, at eingin kann vera so trúgvur móti sínum ektafelaga sum pingvinurnar; tær liva bókstaviliga saman til deyðin skilur tær at.

AT í Vesturtýsklandi byggja teir 180.000 fiólir um árið.

Tordi ikki . . .

(Framhald frá 1. síðu)

gjørdu lógaruppskotið og smíðingina av arbeiðsrammunum fyri lánistovnin, meðan P. M. Dam ikki var í hesum arbeiði og nevndum.

Vit hava ongatíð droymt um at avsanna, at í nevndir og ráði sum vóru sett undir fólkaflokkska — sambandska landsstýrinum komu bara fólkaflokksmenn og ongin sosialistur, illa nokk nakar sambandsmaður.

Men hesin veruleiki rongir einki av tí, vit hava prógvað, at støðan var tann, at fólkaflokkurin ikki tordi at hava nakað skapandi »positivt« samarbeiði við danir. Tað longsta var, at teir sótu kvirrir og súrir og hægst funnið seg í at vera til steðis, meðan hinir arbeiddu og at tankin og grundarlagið við marshallpeninginum og tær til hann knýttu ætlanir fyri realkredittstovnunum vóru skapt undir samarbeiðinum millum danir og fyrsta landsstýrið og landsstýrisflokkarnar, harundir fólkatingsmannin P. M. Dam, sum sambært eftirliggjandi skriftlig skjøl og rapportir tók lut í hesum samarbeiði, ikki minst í samráðingum um marshallpeningin og grundleggingina av einum íleggingarstovni, realkredittinstitutti.

Ein kálvur

9 mánaðir, av góðum mjólkaslagi til sølu.

Ellender Ellendersen
Fámjin.

Skipafelagið Føroyar

TELEFON 1225

Tórshavn

FÆRØSK MARGARINE

Vita No 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

BARNAMATUR

ORÐATØKINI niðanfyri hava tann skeivleika, at fyrri partur av einum er settur saman við seinra parti av einum øðrum. Nú ræður um at seta rætt saman:

1. **Teir mega land byggja, hann lønar tær aftur við háð og spott.**
2. **Hvar maður ikki er sjálvur, og fylgir ikki eftir hugur.**
3. **Hann má líta, ið sjálvur ger sær.**
4. **Ofta mælir muður, er hann ikki meir enn hálvur.**
5. **Ger skálkinum gott, ið vilja liva.**
6. **Tað er ikki sárt, ið minni már**

—o—

TVEY EGG verpur: álka, tjaldur, terna, spógvi.

EGG verpur ella gýtir: hýsa, kalvi skøta, hvítingur.

OYGGIN MAN liggur í: Meðalhavinum, Karibiska havinum, Írska havinum, Bodensjógvinum.

—o—

Rætta svarið kunnu tit lesa í komandi mikudagsblað.

til gamans

— 9 av 10 filmstjørnum brúka LUX, og 9 av 10 politikkarum brúka LUSK.

—o—

— Hví hevur tú bind um nøsina

— Tí ein mýggjabiti beit meg.

— Fekk tú so stórt mein?

— Nei, men beiggi mín drap hann við einum spaka.

—o—

Tað er lítið virði í eini paraply, tá tað er hol á skónum.

—o—

— Verður tú ongatíð móður av at hoyra teg sjálvan tosa?

— Nei, eg lurti ikki eftir mær.

—o—

Pátrúgvin? — ja, t. v. s. eg briggi meg ikki um at vera sjálvur 13. til borðs við 12 øl.

—o—

LINA: Hví sló tú hann?

TINA: Tí hann rópti darling darling eftir mær, og eg veit ikki, hvat tað vil siga.

—o—

MUSIKALSKUR er hann, sum leggur oyrað aftrat lyklarholinum fyri at lurta, tá hann hoyrir eina yndisliga kvinnu syngja í baðirúminum.

—o—

ÓLI: Eg var langt niðurkomin ta ferðina — at enda mátti eg drekka fyri at gloyma.

PER: Er tað ikki vandamikið? Eydnaðist tað?

ÓLI: Bæði eg drakk so nógv fyri at gloyma, at eg gloymdi at drekka